

*Frá vinstru: Uni Gullfoss, Gudmundur Joensen, Jóhan Mouritsen, Jóhannes Olsen, Gutti Harryson, Høgni Midjord og Eivind Akraberg Hansen. Fremst er Høgni Jacobsen. Ken Zachariasen vantar á myndini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Argjabáturin staðfesti alt

**Argjamenn hava verið nógv kroystir á tveimum teimum undanfarnu stevnunum, men á Sørvágsfirði lótu teir ongan iva vera um, hví teir eru vorðnir føroyameistarar. Við einari bátslongd vundu teir burtur úr hinum bátunum í endaspurtinum**

8 MANNAFØR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Ein javnur startur fyri allar bátarnar, men neyvan var startspurturin liðugur, tá reyði báturin av Argjum otaði seg fram um hinar. Tó í harðari kapping við bæði Nevið Reyða og eina løtu Ørv.

Komnir inn um 500 metrar byrjaði Nevið Reyða at bjóða argjamonnum av álvara av. Kvívíkingur og Ørvur kappaðust hesa løtuna um triðja plássið.

Argjamenn svaraðu aftur, tá Nevið Reyða byrjaði at ota seg fram, og tað sá eisini út sum, teir høvdu nógv eftir í sær, tá endaspurturin byrjaði. Og tað høvdu kvívíkingar eisini. Teir otaðu seg longur og longur fram á Nevið Reyða, so tann veruligi spenningurin endaði við at verða um annaðplássið.Tí argjamenn snøgt sagt vundu burtur úr hinum í endanum, og klaksvíkingar og kvívíkingar kundu bara staðfesta, at tá skotið small á málinum, var leyst millum Argjabátin og teir.

Við hesum trygga sigrinum hava argjamenn staðfest við tíggju tumma seymi, at tað er ikki av ongum, at teir eru føroyameistarar hjá áttamannaførunum. Teir hava ein avbera vakran og flottan róður. Um hann er so vakur, at tað fer at geva teimum útvarpssteypið á ólavsøku, kann bara tíðin vísa.

Sum hjá øllum hinum er finaluróðurin á ólavsøku eftir. Hann munnu fleiri enn bara argjamenn kanna sær, nú tvær vikur eru at venja til finaluróðurin.

## TÍÐIR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 06.45.14 |
| 2 | Nevið Reyða | 06.48.06 |
| 3 | Kvívíkingur | 06.49.16 |
| 4 | Ørvur | 06.55.21 |
| 5 | Miðvingur | 07.05.04 |
| 6 | Knørrur | 07.06.11 |
| 7 | Tofta Regin | 07.25.13 |

Jan Suni Hansen á Kvívíkingi:

## –Vilja hava ólavsøkusigurin



– Vit hava ikki verið nóg góðir í ár. Kanska vit ikki orkaðu nóg væl, men konditiónin skuldi so verið komin nú, hvis tað var tað, sum var galið. Eg veit ikki hvat tað er. Vit hava góðan start og tað er gott psykiskt. Men vit klára bara ikki at halda tí. Vit eru allarhelst ikki nóg góðir, sigur hann.

Hann sigur, at teir á Kvívíkingi ætla sær eftir ólavsøkusigrinum.

– Nú fara vit allir ein túr í býin, fyri at fáa moralin upp aftur, og so verður trenað hart inntil Ólavsøkuna, sigur Jan Suni Hansen.

**-eys-**



*Argjabáturin í stórum stíli*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Har var einki at gera hjá hinum í endaspurtinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Sigurssælir argjamenn beint aftaná at skotið brast*

*Mynd: Álvur Haraldsen*






*Leggið til merkis hvíta stavnin, sum kemur undan Jarnbardi. Tað er Sundabáturin, sum var 3/100 sekund frammanfyri*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tað var upp á hangandi hár

**Róðurin hjá seksmannaførum við monnum gjørdist rættuliga spennandi. Tað var so tætt í oddinum, at tað tók langa tíð, áðrenn almenna úrslitið var klárt. Men tá tað so kom, var sum at seta eld í sundafólk**

6 MANNAFØR MENN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Sundabáturin kom best frá startinum. Men honum í hølunum komu bæði Jarnbardur og Gongurólvur. Rættiliga skjótt løgdu hesir tríggir seg í eitt felti fyri seg, og har var spenningur í allar 1.500 metrarnar.

Í miðróðrinum misti Sundabáturin eitt fitt petti, og blái báturin úr høvuðsstaðnum legði seg framum. Honum á baki kom Gongurólvur eisini, so eina løtu var kapping millum hesar báðar høvuðsstaðarbátarnar.

Men sum vant, so kom Sundabáturin afturíaftur í sjálvum endaspurtinum. Men tætt var. Tá róðurin var av, var ikki meira enn man hómaði hvíta stavnin á Sundabátinum undan Jarnbardi. Men tað var nóg mikið til at geva Sundabátinum sjey stig og sigurin á Vestanstevnu saman við føroyameistaraheitinum.

Aftan á róðurin var fýrverk skotið fyri sundamonnunum, og allir fjepparararnir stóðu og róptu og skrálaðu sigursæl inni á kaiini. Sangurin hjá Sundabátinum ljóðaði um allar geilar, og sum vera man var lagið gott.

Hetta var seinastu ferð, at róð var á 1.500 metrum, og nú er bara ólavsøkuróðurin eftir. Har munnu nógvar manningar vera tystar eftir gullinum, tí tað er eitt stórt plástur á sárið fyri aðrar manningar at vinna ólavsøkufinaluna, tá kappingin um føroyameistaraheitið er avgjørd.

## TÍÐIR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sundabáturin | 07.12.04 |
| 2 | Jarnbardur | 07.12.07 |
| 3 | Gongurólvur | 07.13.02 |
| 4 | Strálan | 07.18.01 |
| 5 | Lómur | 07.19.15 |
| 6 | Víkingur | 07.20.02 |
| 7 | Sølmundur | 07.22.10 |
| 8 | Hósvíkingur | 07.23.15 |
| 9 | Hvessingur | 07.31.00 |
| 10 | Sandingur | 07.32.15 |
| 11 | Smyril | 07.38.03 |

Kjartan Mohr á Jarnbardi:

## Katastrofalan start



– Starturin hjá okkum hevur ongantíð verið nakað at reypa av, men í dag var hann katastrofalur. Men tað skal nú ikki vera nøkur umbering fyri, at vit taptu í dag, sigur Kjartan Mohr, ein av rógvarunum á Jarnbardi.

Hann heldur fram, at teir so nógv heldur vildu havt tapt við einari heilari bátslongd enn við so lítlum muni.

Men hann leggur dent á, at føroyameistaraheitið reyk fyri teirra viðkomandi á Jóansøku, tá teir einans megnaðu eitt sættapláss.

– Jóansøkuróðurin var eitt gott tekin um, at vit ikki eru vandir rógvarar. Vit dugdu als ikki at rógva undir hasum umstøðunum, og tí gekk tað, sum tað gekk. Men hon var okkum dýr, sigur Kjartan Mohr.

Nú fara Jarnbarda menninir, sum allar aðrar manningarnar, at venja hart til seinasta róðurin í ár.

– At vinna ólavsøkuna hevði verið gott, men, men … sundamenninir eru góðir, sigur Kjartan.

**-sae-**



*Spenningurin var øgiligur hjá seksmannaførum við monnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Frøin var stór, tá úrslitið endiliga varð klárt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*